# 8 spurningar um jól

**Høgni Hoydal**

***Hvat er tað besta við jólum?***
- At vit sum samfelag hava gjørt av at seta av hesar dagarnar um árið til burturav at kunna lata kærleika, gleði og menniskjalig sambond við familju og kenningar, hava fyrsta rætt. At vit kunnu seta børnini í miðdepilin og sjálvi seta okkum aftur í barnsins hugaheim. At vit kunnu gera upp hvørji verulig virði, vit seta hægst og kunnu endurskoða tað, sum er farið, og gera okkum góðar vónir til komandi ár.

***Hvat er tað keðiligasta við jólum?***
- At eg sjáldan klári at liva upp til míni ideal og mínar ætlanir á jólum. At vit ofta lata tey peningaligu sambondini og tey materiellu virðini taka so nógv yvir, at vit brúka kanska 10 ferðirnar so nógva tíð og orku til at fyrireika alt tað materiella og skrúva væntaninar upp í topp. Og at tey, sum ikki eru við á tí "perfekta" vogninum kunnu kenna seg rættiliga einsom og tunglynd á jólum.

***Hvussu helt tú jól sum barn?***
- Altíð hjá ommu og abba. Saman við foreldrum, systrum, systkinabørnum og teirra familju. Fyrst uppi á Hálsi í Havn og síðani í Hoyvík, tá omma og abbi fluttu niðan. Tað eru luktir, smakkir, hugni og minnir, ið eg ongantíð gloymi.

***Hvussu heldur tú jól í ár?***
- Saman við konu, børnum og so stórum parti av familjuni og verfamiljuni sum gjørligt. Tíbetur koma bæði mamma mín og pápi mín heim á jólum úr ávíkavist Danmark og Bretlandi. Ein systur hjá mær, sum býr uttanlands kemur tíverri ikki heim.

***Hvat heldur tú um jólaresið í desember?***
- Kann gerast alt ov mikið - serliga hjá kvinnunum, tí javnstøða er sum lundi á jólanátt,



tá tað kemur til jólafyrireikingarnar. Annars hevur verfaðirin hjá mær úr Íslandi ein fínan sið við at gera tollaksmessudag til ein dag, har bara skal gangast í býnum og uppliva alt stásið og stákið.

***Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?***
- Ja, eg havi hildið jól í Danmark, tá eg las. Tíbetur átti eg eina ommu og ein mammubeiggja í Danmark, so tað var deiligt at vera saman við teimum. Okkum longdist tó serliga illa heim tey jólini.

***Keypir tú sjálv/ur tínar jólagávur?***
- Bert nakrar fáar. Til konuna, børnini og okkurt afturat. Annars leggur Hildur alt hetta til rættis, og hon ger eisini sjálv eina rúgvu av jólagávum.

***Hvat ynskir tú tær í jólagávu?***
- Fyrst og fremst, at jólini og nýggjárið fara at bera mest møguliga gleði við sær og ikki nakra sorg.


























